# Faroe Marine Biotech undir framleiðslu

**Framleiðsla av rálýsi og hávirðis krotum úr fiskalivur er fyrsta stig í ætlanini hjá Faroe Marine Biotech, sum í framtíðini skal undir hávirkaða framleiðslu av gelatini og øðrum úrdráttum úr slógvi**

FISKIVINNA
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*



*Egil Olsen, stjóri í Faroe Marine Biotech, her avmyndaður á trappuni heima í Saltangará*

*Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com*

Aftan á drúgvar fyrireikingar verður nú farið í gongd á Eiði við framleiðslu av biotøkniskum úrdráttum, upplýsir Egil Olsen, stjóri í Faroe Marine Biotech. Í fyrstu syftu er talan um royndarframleiðslu av rálýsi burtur úr fiskalivur, og tá hesar royndarkoyringar eru lidnar skal so farast undir veruliga framleiðslu, skilst.

Hugtakið aftan fyri Faroe Marine Biotech byggir á at tann fiskur ið føroyingar veiða kann sum heild gagnnýtast væl meira enn hann verður ídag. Við hjálp av framkomnari tøknifrøði kunnu tær sokallaðu hjávørurnar úr fiskinum virðisøkjast og gerast um til ymiskar úrdráttir at útflyta til Europa, Japan, og USA.

Talan er um ein stóran og vaksandi marknað ið ofta verður býttur upp í fýra segment, nevniliga matvørur, heilsukostur og kosttilskot, heilivágur, og kosmetika. Sum skilst skulu Faroe Marine Biotech ta fyrstu tíðina virka sum undirveitari hjá framleiðarum av fiskaolju kapslum, eitt væl umtókt kosttilskot í nógvum londum.

Stórar avbjóðingar liggja í at fáa til vega vitan og tøknifrøði umframt ta fíggjarligu orkuna ið krevst til vørumenning. Tí er eisini umráðandi at velja út rætt marknaðar segment og fokusera, samstundis sum tað ræður um at gera gongdina til marknað so stutta sum møguligt.

»Frá vørumenning til fulla framleiðslu kunnu ganga nógv ár og krøvini til vitan so væl sum kapital eru sera høg í hesari vinnuni,« segði Egil Olsen. »Men vit eru nú eftir tógvið stríð komin so mikið væl áleiðis at okkara fyrsta framleiðslu stig er aktuelt nú… Vit fara um fáar dagar at royndarframleiða, og so skjótt vit eru liðug at royndarkoyra útgerð og arbeiðsgongdir, seta vit veruliga framleiðslu í gongd.«

## Sparikassa fígging

Hjávørur av fiski fevna um tað tilfeingi sum ikki kemur til lands við rávøruni, nevniliga livur, sil, rogn, magar og aðrir innvølir, umframt tær fiskarestir ið stava frá høvuðs viðgerðini av rávøruni á landi, so sum høvd, ryggir, skræða og avskurður.

»Teir vinnuligu møguleikarnir í biotøkni eru sera stórir,« segði Egil Olsen. »Talan er í stóran mun um ótroyttar møguleikar í føroyskari fiski- og alivinnu hvat hjávørum viðvíkur… Hetta hevur, saman við okkara góðu sambondum við biotøkniskar fyritøkur uttanlands, umframt einum almennum ynski um at fáa í gongd slíka vinnu í Føroyum, verið við til at fáa okkum at trúgva upp á hesa vinnu.«

Egil Olsen roknar við at um fá ár arbeiða umleið 15 fólk hjá Faroe Marine Biotech.

Við fígging frá Føroya Sparikassa, aftan á eina hækking av partapeninginum til smáar fýra milliónir krónur, hava Faroe Marine Biotech keypt høllina hjá tí sum var HydroTech umframt útgerð til framleiðslu av biotøkniskum úrdráttum. Útgerðin er installerað soleiðis at fyrsta stig í ætlan felagsins nú kann setast í verk so skjótt neyðugar royndarkoyringar eru gjøgnumførdar. Hvat viðvíkur tí fíggjarliga, er Egil Olsen sera takksamur fyri tann stóra áhugan ið Sparikassin hevur sýnt felagnum.

Fyrsta stigið í ætlanini hjá Faroe Marine Biotech snýr seg um at framleiða rálýsi og hávirðis krotur úr fiskalivur; um tvey-trý ár skal síðani farast undir annað stigið sum fevnir um framleiðslu av gelatini úr fiskaskræðu; nøkur ár seinni skal so, á triðja stigi, farast undir ta meiri hávirkaðu framleiðsluna av enzymum og tílíkum úrdráttum.

Endamálið hjá Faroe Marine Biotech er at optimera virðið og gagn-nýtsluna av hjávørum úr fiskivinnuni í Føroyum; biotøknisk menning og framleiðsla av hávirðis úrdráttum úr hjávørum frá fiski og alivinnuni; gransking; luttøka í norðurlendskum og altjóða verkætlanum; nýskapan og førleikamenning; ráðgeving og umboðan.

## Útlendingar uppií

Tað var neyvan av tilvild at júst Eiði varð valt til sæti hjá partafelagnum Faroe Marine Biotech. Egil Olsen dylir ikki fyri at eitt tilboð um yvirtøku av fyrrverandi hølunum hjá HydroTech gjørdi sítt, men fleiri aðrir tættir vóru eisini í myndini.

»Eftirsum Eiði hevur bæði Norðís, Salmon Protein og Bátafisk, kunnu vit rokna við at tað er lutfalsliga høgligt at fáa hendur á rávøru her. Síðani kemur sambandið við Havnina og restina av Eysturoynni, sum eisini er rættiliga gott. Eitt annað sum ávirkaði okkum til at velja Eiði, var at vit fingu eitt gott tilboð um at keypa hendan stóra og fína bygningin sum HydroTech hevði; eg rokni við at vit kunnu húsast her í rættiliga langa tíð áðrenn tað gerst trongt.«

Samstundis sum Faroe Marine Biotech í vár keypti HydroTech høllina, varð daglig leiðsla sett í felagnum. Hendan er samansett av, umframt Egil Olsen sum stjóra, virkisleiðaranum Annu Katrin Matras, tekniska leiðaranum Absalon Wolles, og fíggjarleiðaranum Eyðun Gaardabo.

Formaður í nevndini fyri Faroe Marine Biotech er Gestur Hovgaard, Granskingardepilin fyri Økismenning; hinir nevndarlimirnir eru Viktor B. Johansen, Maritex (Noreg); Eirikur á Húsamørk, Faroe Marine Products; Ólavur Bjarkhamar, Delta Seafood; Adrian Dalsá, Shetland Islands Council; Geir W. Wold, Vesterålens Hermetikfabrikk (Noreg); Ólavur Asafsson Olsen, KJ Hydraulik.

Føroyskar fiskivinnu fyritøkur eiga góð 26 prosent av partapeninginum í Faroe Marine Biotech, meðan føroyskar tænastufyritøkur í fiskivinnuni eiga smá 25 prosent, útlendskir íleggjarar í fiskivinnuni góð 22 prosent, ein íleggingar grunnur á Eiði smá 8 prosent, privatpersónar í fiskivinnuni smá 8 prosent, og aðrir privatpersónar góð 11 prosent.



*Tangarnir til rálýsi eru partur av framleiðslu útgerðini á Eiði*

*Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com*



*Fyrrfyrandi bygningurin hjá HydroTech, sum Faroe Marine Biotech hevur yvirtikið*

*Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com*



UTTAN ÚR HEIMI

# USA skal hava rakettir í Bretlandi

**Rakettirnar verða partur av amerikanska rakettverjuskjøldrinum, men Damark hevur ikki fingið fyrispurning um loyvi at seta rakettir upp í Grønlandi**

VERJUSKJØLDUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í Bretlandi vil blaðið The Independent vera við, at bretska stjórnin hevur givið USA loyvi at seta rakettir upp á bretskari jørð sum lið í tí ætlaða rakettverjuskjøldrinum hjá Bush-stjórnini.

Sambært blaðnum hevur Tony Blair, forsætisráðharri, boðað amerikonsku stjórnini frá, at Bretland góðtekur, at rakettirnar verða settar upp Blaðið sigur seg hava fingið at vita, at málið var fyri á einum fundi ímillum bretskar og amerikanskar diplomatar í mai, og at partarnir samdust um, at tær amerikonsku rakettirnar skulu setast upp á flogstøðini Fyllingdale í Yorkshire. Amerikanararnir hava fyrr fingið loyvi at seta eina nútímans radarastøð upp har.

Amerikanska verjan er longu farin undir at seta 16 rakettir upp í Kalifornia og Alaska. Sagt verður, at tað verður neyðugt við 24 rakettum afturat til verjuskjøldurin, og at tær flestu teirra helst skulu setast upp í Evropa.

Danskir og grønlendskuir myndugleikar hava játtað USA at nútímansgera radarastøðina í Thule, men sambært Politiken hevur Danmrk ikki fingið nakran fyrispurning úr Washington um loyvi at seta rakettir upp í Grønlandi.

# Al-Qaeda er við í mótstøðuni í Irak

**Jordanski yvirgangsmaðurin al-Zarqawi sigur nú, at al-Qaeda er við til at leggja mótstøðuna í Irak til rættis**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Var einki samband ímillum Irak og yvirgangsfelagsskapin al-Qaeda, tá Saddam Hussein ráddi fyri borgum, so ber ikki til at siga tað sama nú.

Gjáranáttina kunngjørdi jordanski yvirgangsmaðurin Abu Musab al-Zarqawi, at hansara felagsskapir, Tawhid og Jihad, arbeiða saman við al-Qaeda fyri at gera enda á fíggindum Islams, sum eru komnir til Irak, sum tikið varð til.

– Vit almannakunngera, at leiðarar og hermenn hjá Tawhid og Jihad hava svorið Osama bin Laden trúskap stóð í boðunum frá al-Zarqawi.



*Fyri fyrstu ferð hevur Abu Musab al-Zarqawi boðað frá, at hann samstarvar við Osama bin Laden um mótstøðuna í Irak*

*Mynd: Reuters*

USA hevur leingi lagt al-Zarqawi undir at hava skipað fyri mótstøðuni í Irak, og amerikanska stjórnin hevur lovað 25 milliónir dollarar í finningarløn, verður hann avdúkaður og tikin.

Serfrøðingar í yvirgangi hava higartil sagt, at einki samband hevur verið ímillum al-Zarqawi og bin Laden, men nú er líkt til, at teir hava tikið seg saman ímóti amrikanarunum í Irak, skrivar Reuters.

Tawhid og Jihad hava átikið sær ábyrgdina av fleiri burturflytingum og avrættingum í Irak. Hildið verður, at al-Zarqawi sjálvur hevur avrættað nøkur av teimum burturfluttu.

# Lukasjenko vann ivaval

Hvítarussiski forsetin sleppur at stilla uppaftur.

Alexander Lukasjenko, forseti í Hvítarusslandi, verður ofta umrøddur sum tann seinasti einaræðisharrin í Evropa, og nú hevur hann tryggjað sær rætt til at stilla upp til eitt valskeið afturat.

Fyri at hann kundi stilla upp fyri triðju ferð, mátti grundlógin broytast, og á fólkaatkvøðu um vikusiftið atkvøddu 77 prosent fyri at broyta grundlógina, so Lukasjenko kann halda fram.

Tað er úrslitið hjá teirri almennu valnevndini, men andstøðan leggur myndugleikarnar undir grovt valsvik. Sambært valnevndini var valluttøkan 90 prosent, men anstøðan sigur, at minni enn helmingurin av veljaranum atkvøddu, og at fólkaatkvøðan tí var ógyldug. BBC sigur seg eisini hava prógv fyri valsviki.

## Rændu gentu

Myndugleikarnir í Grikkalandi hava tikið tríggjar menn úr Bulgaria og skuldsett teir fyri at hava rænt eina 16 ára gamla bulgarska gentu og flutt hana til Grikkalands. Gentan er við barn, og ætlanin hjá burturfltarunum var, at eini barnleys hjún í Athen skuldu keypa barnið.

Gentan bleiv burturflutt tann 1. oktober. Hon bleiv fyrst flutt til Eysturríkis og síðani til Grikkalands, har hon varð stongd inni í einari íbúð í Athen. Seinasta fríggjadag eydnaðist tað henni at flýggja, og hon boðaði alt fyri eitt griksku løgrgluni frá tí, sum hent var. Stutt eftir vórðu teir tríggir bulgararnir tiknir, og myndugleikarnir kanna nú, um teir munnu hava burturflutt fleiri bulgarskar gentur, sum hava verið við barn.

Grikska løgreglan sigur, at mamma gentuna hjálpti teimum trimum monnunum at burturflyta gentuna. Bulgarsku myndugleikarnir siga, at tann 39 ára gamla mamman er eftir øllum at døma flýdd av landinum, og tí leitar Interpol nú eftir henni, skrivar VG.

## Kappast um olju í Iran

Tey bæði stóru norsku oljufeløgini, Statoil og Hydro, kappast um, hvørt teirra skal sleppa at útbyggja tað risastóru iransku oljuleiðina Yadavaran.

Iransku myndugleikarnir hava boðað frá, at innan ársskiftið fara teir at taka støðu til, hvat ella hvørji oljufeløg skulu sleppa at byggja Yadavaran út. Síðani hava Statoil og Hydro boðið seg fram. Statoil er við í einari stórari gassverkætlan har suðuri í Iran, og Hydro eigur 75 prosent av rættindunum í einum oljuøki nakað norðan fyri Yadavaran og stutt frá irakska markinum.

Iranskar kanningar benda á, at umleið 17 milliardir tunnur av olju eru í Yadavaran-økinum, og at tað fer at bera til at útvinna 14 milliardir tunnur haðani. Tann parturin, sum Statoil og Hydro kappast um, verður metur at kunna geva ímillum 300.000 og 400.000 tunnur um dagin, skrivar Aftenposten.

## Nader vil ikki gevast

Ralph Nader, sum enn eina ferð stillar upp sum óheft valevni til forsetaval í USA, sýtir fyri at taka seg aftur, sjálvt um veljarakanningar vísa, at hann fær ikki meiri enn eitt prosent av atkvøðunum.

Demokratarnir vilja hava Nader at taka seg burtur úr valstríðnum. Teir vísa á, at á valinum fyri fýra árum síðani fekk Ralph Nader, sum tá stillaði upp fyri Tey Grønu, 100.000 atkvøður í Florida, og at tað var orsøkin til, at George W. Bush vann á Al Gore har og tískil forsetasessin. Men Nader vil ikki gevast. Hann sigur, at ein og hvør hevur loyvi at stilla upp til forsetavalið, og at hann ger tað, tí teir báðir stóru flokkarnir leggja alt ov lítlan dent á mál, sum hann sjálvur heldur hava stóran týdning.

Ralph Nader hevur fyrr boðið sær til at stuðla demokratarnar upp undir valið í næsta mánað, men tá søgdu demokratarnir nei takk.

## Funnu gamla borg

Fornfrøðingar hava funnið borgina hjá gamla Djengis Kahn, og tað hevur givið teimum og øðrum áhugaðum eina vón um, at tað kanska fer at bera til at finna grøv hansara eisini.

Mongolskir og japanskir fornfrøðingar funnu borgina har eysturi í Mongolia, og tað hevur givið fornfrøðingum og øðrum áhugaðum eina vón um, at kanska ber tað til at finna grøv hansara eisini. Hetta er ikki fyrstu ferð, at fornfrøðingar hava leitað eftir bústaðnum hjá tí stóra landtakaranum. Í 1993 varð ein roynd gjørd, men teir mongolsku myndugleikarnir steðgaðu arbeiðinum, og tað gjørdu teir eisini, tá ein onnur roynd bleiv gjørd fyri tveimum árum síðani.

Djengis Kahn hersetti stórar partar av Asia. Søgufrøðingar siga, at verður grøv hansara funnin, verður tað uttan iva neyðugt at skriva ein part av veraldarsøguni umaftur, tí grøvin hevði væntandi avdúkað, at sambandið ímillum eystur og vestur var munandi størri á hansara døgum enn higartil hildið.